# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Hópuppsøgn á Tryggingini

**Átta fólk eru søgd úr starvi hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Hetta er liður í eini rationalisering og tillagan av fyritøkuni til at møta framtíðar avbjóðingum, sum m.a. liggja í nýggjari tryggingarlóggávu og fyri at sleppa undan reyðum tølum á botnlinjuni. Farið verður frá einum meira fyrisitingarvendum bygnaði til eina skipan, har kundin verður raðfestur hægri**



*Edvard Heen, stjóri og Gunnar í Líða forstjóri hjá Tryggingarfelagnum Føroyar vilja nú venda gongdini hjá felagnum, sum hevur havt reyð tøl á botnlinjuni í tryggingarvirkseminum í fimm ár*

*Mynd Jan Müller*

UPPSAGNIR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Átta av starvsfólkunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar eru uppsøgd. Henda minking av starvsfólkum er í tráð við ta strategiætlan, sum leiðsla og nevnd í felagnum hava arbeitt við, nú nógvar nýggjar avbjóðingar standa fyri framman eitt nú í sambandi við nýggja tryggingarlóg, sum løgtingið er um at seta í verk. Síðani 1. juni hevur tryggingarfelagið minkað um starvsfólkatalið við tilsamans 15 fólkum, sum svarar til 13% av øllum starvsfólkahópinum. Hini sjey er farin sjálvboðin. Í dag arbeiða umleið 100 fólk hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Edvard Heen, stjóri leggur dent á, at uppsagnirnar eru í tráð við tær sáttmálabundnu reglur, sum eru galdandi, og at øll starvsfólkini, sum eru uppsøgd, eru kunnað um hetta samsvarandi hesum reglum. Hann leggur stóran dent á, at uppsagnirnar ikki eru ein avleiðing av ónøgd við starvsfólkini, men hetta kemst av broytingum í verandi bygnaði og teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman.

### Og tung

-Vit eru vorðin ein ov tung fyritøka og hava havt reyð tøl á botnlinjuni av tryggingarvirkseminum í fimm ár, og henda gongdin kann ikki halda fram. Fyri at venda gongdini, hevur tað verið neyðugt neyvt at gjøgnumganga rakstrarúrreiðslurnar í felagnum, við tí fyri eyga at tryggja ein kappingarføran rakstur. Felagið hevur tí, aftaná at eftirmeting er gjørd av bygnaðinum og rakstrarútreiðslunum, funnið tað neyðugt at minka um talið av starvsfólkum. Vit eru noydd til at gera rationaliseringar og broyta bygnaðin, soleiðis at hann samsvarar við gongdina í samfelagnum. Edvard Heen sigur, at nýggja strategiin snýr seg um at fara frá einum meira fyrisitingarligum bygnaði til ein meira kundarættaðan bygnað. Tvs. at tey fara at menna sølu- og marknaðardeildina við tí fyri eygað at koma skjótari, betri og lættari út til kundan. At fáa ein meira nøgdan kunda.

### EDV-parturin

Hetta er sjálvandi ein tilgongd, sum fer at taka tíð, men vit síggja, at vit mugu leggja okkum meira eftir sølu- og marknaðarpartinum heldur enn tí fyrisitingarliga. Nýggja tøknin ger hetta so eisini møguligt. Tryggingarfelagið hevur gjørt stórar íløgur í EDV, har man er farin frá at brúka fleiri ymsar tryggingarskipanir til bara at brúka eina ella so. Vit umhugsa so eisini at minka um talið av EDV-veitarum, har talan higartil hevur verið um ikki færri enn seks ymiskar við danska BEC sum høvuðsveitara.

Edvard Heen heldur sjálvur, at nýggja tryggingarlóggávan fer at geva møguleika fyri at skapa meira dynamikk, og tað er hetta, sum fyritøkan nú gierar seg til bæði hvat víðvikur innlendis- og útlendis kappingini. –Sjálvandi er tað svárt at skula siga fólki upp, sum hava gjørt eitt gott arbeiði, men av tí at starvsfólkaútreiðslurnar viga so nógv, eru vit noydd at fremja rationaliseringar har.

### Frá monopolstøðu

Gunnar í Líða, forstjóri og sum hevur starvast í felagnum í mong ár, sigur, at stigini teir hava tikið eru ein náttúrlig fylgja av, at man er farin frá eini monpolstøðu til eina kappingarstøðu, har eisini ein onnur fyritøka er. Sum er er duopol við hesum báðum fyritøkum, men tá nýggja tryggingarlógin kemur í gildi, kunnu aðrar tryggingarfyritøkur koma inn á marknaðin umframt at føroyskar fyritøkur kunnu fara út um landoddarnar. Alt hetta setir bæði størri og nýggj krøv til fyritøkuna sigur Gunnar í Líða við Sosialin.

Tað er eingin loyna, at Tryggingarfelagið Føroyar hevur verið ómetaliga óheppið í seinastuni við eitt nú eldskaðum umborð á Hercules og Athenu. Báðir tryggingarstjórarnir siga við ein munn, at hesir skaðar eru ikki orsøkin til uppsagnirnar.

# Leiðaraútbúgving til byggivinnuna

**Skeiðsdepilin bjóðar, í samstarvi við skeiðsfyritøkuna Vitus Bering Danmark, eina nýggja leiðarútbúgving fyri fólk innan byggivinnuna**

ÚTBÚGVING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Endamálið er, at luttakararnir fáa nakrar beinleiðis nýtsluvendar persónligar førleikar, ið tørvur er á fyri at fremja sítt arbeiði. Samstundis fáa luttakararnir grundleggjandi leiðsluførleikar til at reka eina byggifyritøku ella stýra einari arbeiðstøku.

Útbúgvingin er í fýra modulum: leiðsla, búskapur, lean framleiðslustýring og marknaðarføring, og ein persónlig undirvísingargongd verður løgd til rætissa, grundað á royndi.

Undirvísingin fer fram sum blandað læring. Frálærutímar við persónligari vegleiðing, hjáveru undirvísing og samvirkandi, livandi frálæra umvegis internetið. Útbúgvingin er fyri fólk við eini vinnuútbúgving innan bygging og anlegg og minst 2 ára vinnuroyndir, umframt leiðsluroyndir.

Royndir undirvísarar frá Vitus Bering Danmark og Skeiðsdeplinum taka sær av frálæruni. Eitt modulprógv verður givið fyri staðið modul. Samstundis verður eitt europass givið.

Til ber at lesa um útbúgvingina og tilmelda seg á www.skeidsdepilin.fo.

# Semja ella nýval

**Verður semjan hjá løgmanni og floksformonnunum í samgonuni ikki samtykt, verður endin helst nýval**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Júst afturkomin av almennari vitjan á Álandi, kallaði løgmaður floksformenn Sambands- og Fólkafloksins til fundar í gjár um politiska knútin, sum er íkomin eftir at fleiri samgongutingmenn hava gjørt greitt, at teir ikki taka undir við semjuni, sum løgmaður og floksformenninir hava gjørt.

- Vit ásanna, at tvinnir eru kostirnir. Annar er, at broytingaruppskotið, um at lógin fyrst fær gildi eftir komandi løgtingsval, verður samtykt. Hin møguleikin er at ásanna, at trupult verður at avgreiða mongu málini, ið vit hava sett okkum. Avleiðingin kann tá verða val í ótíð, sigur løgmaður.

Kaj Leo Johannesen, Jørgen Niclasen, Kristian Magnussen og Jóannes Eidesgaard, løgmaður, eru samdir um at virka fyri, at broytingaruppskotið verður samtykt, og teir hava góðar ábendingar um, at uppskotið verður samtykt, sigur løgmaður.



*– Nýval er hugsandi, heldur løgmaður*